Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Uni Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Frádráttur fyri húsaleigu

Spurningur:

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at leggja uppskot fyri Løgtingið fyri at broyta frádrátt fyri húsaleigu sum bruttoskatt?

Viðmerkingar:
Fleiri leigubústaðir vórðu brúktir til útleigan gjøgnum Airbnb, og tískil valdi Løgtingið at samtykkja frádrátt á 100.000 kr. til teirra, sum leiga út beinleiðis til privatfólk í minst tríggjar mánaðir. Hetta skuldi føra við sær, at fleiri útleigarar valdu at langtíðarleiga til føroyingar, ístaðin fyri at leiga út til stutttíðarleigu, millum annað Airbnb.
Sum lógin er í dag, so er frádrátturin á 100.000 kr. til teirra, sum leiga út beinleiðis til privatfólk í minst tríggjar mánaðir, men lækkar hesin frádráttur í 2022 til 50.000 kr. Hetta fer helst m.a. at føra við sær, at fleiri, sum langtíðarútleiga til privatfólk, fara at rinda meira í skatti frá 1. januar 2022.
Lækkingin í frádráttinum frá 100.000 kr. til 50.000 kr. førir við sær, at tað verður minni áhugavert fíggjarliga at langtíðarleiga til privatfólk.
Av tí, at tað enn er stór bústaðarneyð, er framvegis neyðugt, at so nógv leigumál sum gjørligt verða brúkt til langtíðarleigu til privatfólk. Avleiðingin av lækkingini í frádráttinum kann verða, at fleiri leigumál verða søgd upp, og sostatt gerst bústaðarneyðin enn størri.
Spyrjarin ynskir at fáa at vita, um nakrar ætlanir eru um at leingja verandi frádrátt á 100.000 kr., fyri at tryggja útboðið av leigubústøðum til langtíðarleigu til privatfólk.
Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 7. mai 2021

Uni Rasmussen